**Vinnuferð til Suðurkorea 7.–12. juni 2026!**

Vinnuhúsið skipar í samstarvi við Uttanríkistænastuni og DI Suðurkorea í døgunum 7.–12. juni 2026 fyri almennari vinnuferð til Suðurkorea.

Endamálið við ferðini er at knýta sambond millum føroyskt og suðurkoreanskt vinnulív, innan eitt nú fiskivinnu, alivinnu, veitaravinnu, tøkni, skipasmíð, havnir og flutning. Samstundis er eitt yvirskipað mál at arbeiða fram ímóti einari handilsavtalu, sum kann betra um handilstreytirnar millum Føroyar og Suðurkorea.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur váttað politiska luttøku. Ætlanin er, at eitt landsstýrisfólk stendur á odda fyri vinnuferðini, men endalig støða verður tikin til hetta, tá nýtt landsstýri er skipað.

Yvirskipaði karmurin um vinnuferðina er altjóða matvørumessan Seoul Food Expo. Í hesum sambandi hava føroyskar fyritøkur góðar møguleikar at leggja til rættis B2B-fundir við suðurkoreanskar fyritøkur. Vinnuhúsið hevur eisini sambond í Suðurkorea og kann, um tørvur er á tí, vísa á viðkomandi samstarvspartar.

Suðurkorea er ein týðandi marknaður fyri fiskavørur og telist millum tey lond, sum eta mest fisk í heiminum per íbúgva. Hetta ger landið serliga áhugavert fyri føroyskar matvøruútflytarar, samstundis sum møguleikar eru fyri at styrkja samstarv innan aðrar vinnugreinar. Ítøkiliga hevur Suðurkorea víst áhuga fyri tøkni og reiðskap til fiskiveiðu.

Ferðin er skipað við tveimum døgum í Seoul, har matvørumessan er snúningspunktið, og síðani tveimum døgum í Busan, har m.a. vitjað verður á skipasmiðju og nýmótans havn, umframt at fundir verða innan fiskivinnu.

Fyri at tryggja munagóða úrtøku fyri luttakarar, verður eisini skipað fyri vitjanum og fundum við viðkomandi vinnupørtum í báðum býum.

**Prísur og íroknað:**
Innleiðandi prísurin er úr kr. 22.220,- fyri hvønn ferðandi (economy flogferðaseðlar) og umleið kr. 38.951,- (Premium Comfort flogferðaseðlar).

Íroknað prísinum er:
- Flogferðaseðlar Føroyar–Seoul t/r (economy ella premium comfort)
- Gisting á Glad Hotel Yeouideo Seoul við morgunmati í 2 nætur
- Gisting á Wyndham Grand í Busan við morgunmati í 2 nætur
- Bussur í samband við komu og fráferð millum flogvøll og hotell
- Express tok millum Seoul og Busan t/r

Endaligur kostnaður verður avgreiddur beinleiðis millum luttakara og Sensen Travel, og er tengdur at vali av flogsetri og nær bílagt verður.

**Ferðaskrá**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 07 JUN | Faroe Islands – Copenhagen | 08:20 | 11:25 / 18:20 | 21:25 |
| 07 JUN | Copenhagen – Seoul | 23:55 | 18:35+1 | |
| 12 JUN | Seoul – Copenhagen | 23:35 | 06:00+1 | |
| 13 JUN | Copenhagen – FAROE ISLANDS | 12:25 | 13:40 | |

**Praktiskir upplýsingar:**
**Visum:** Neyðugt er at søkja um sokallað K-ETA (Korea Electronic Travel Authorization) tá ið ferðast verður til Suðurkorea. Vegleiðing og leinki til at søkja um K-ETA er her: www.k-eta.go.kr/portal/newapply/index.do

**Koppseting:** Til ber at lesa nærri vegleiðing um koppseting, tá ið ferðast verður til Suðurkorea á heimasíðuni

hjá danska Serum Institut her: Serum Institut

**Tilmelding:**
Tilmelding fer fram við at venda sær til Sensen Travel á teldupost: booking@sensen.fo, ella á tlf +298 61 80 80, skjótast til ber.

Freist fyri tilmelding er 24. apríl 2026.

Um tit hava spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til:
Øssur M. Dalbúð, ossur@industry.fo / +298 73 99 11